# Pengarnir hjálpa ikki

**Karsten Hansen, landsstýrismaður, heldur ikki, at landið fær nóg mikið burturúr játtanini, tá ið landið hevur játtað fleiri pengar seinastu árini, men støðan bara versnar. Løgmaður ætlar ikki sjálvur at gera nakað við málið**

HEILSUVERK
*Heri á Rógvi*

Tá vit fingu orðið á Karsten Hansen, landsstýrimann, fríggjamorgunin, og spurdu hann, hvat hann helt um støðuna við sjúkrastystrunum á B6, so svaraði hann fyrst, at hetta sjálvandi ikki var hansara málsøki at umsita, men hann kundi undrast á nøkur ting í hesum sambandi.

-Vit hava nú í fleiri ár játtað fleiri pengar til heilsuverkið og landssjúkrahúsið, og hetta er harafturat umframt lønarhækkingarnar. Framvegis so gerst støðan tó bert verri og verri hjá heilsuverkinum, og vit hoyra bert um, hvussu ring støðan er, sigur Karsten Hansen.

Hann leggur dent á, at teir hava játtað yvir 10 míó. meira til sjúkrahúsini seinasta árið, men tað tykist bert sum um, at hetta ger støðuna verri.

Karsten Hansen sigur, at tað ikki skal skiljast soleiðis sum um, at tað sum sjúkrasystrarnar á B6 bera fram ikki er rætt. Somuleiðis sigur hann tað als ikki vera nakað hald í tí, at hetta nú skal vera eitt gjald fyri fullveldi.

-Vit kunnu seta okkum tann spurning: Hvat er tað vit betala fyri?, sigur Karsten Hansen.

Landsstýrismaðurin setir spurnartekin við bygnaðin, tá ið støðan er so mikið ring sum hon er. Hann sigur seg somuleiðis áður hava skotið upp, at skipa eina nevnd at hyggja nærri eftir júst hesum viðurskiftunum, men hetta var ikki vilji fyri í landsstýrinum.

Tá vit spyrja hann, um hann nú fer at krevja meira, sigur hann, at tað er klárt, at hann má krevja meira, men tað er trupult hjá honum at gera tað nógva, tá ið tað er løgtingið sum játtar peningin og annað stýri sum umsitur.

### Ger einki

Tá málið við uppsagnunum á Landssjúkrahúsinum var frammi í sambandi við uppsagnina av Jógvan Mørkøre, so hótti løgmaður, Anfinn Kallsberg, við sjálvur at taka neyðugu stigini.

Í hesum førinum ætlar løgmaður ikki at gera so nógv burturúr, tá hann eisin metir, at hetta er heilt annað mál.

-Málið hevur verið viðgjørt í landsstýrinum, og málið liggur hjá Sámali Peturi í Grund og Almanna og heilsumálinum at umsita, sigur Anfinn Kallsberg.

Løgmaður hevur onga viðmerking til úttalilsini hjá Karsten Hansen.

Tað eydnaðis okkum ikki at fáa eina viðmerking frá Aibritt á Plógv, aðalstjóra ella forkvinnuni í Sjúkrasystrafelagnum.



*Karsten setir spurnartekin við, hvat játtanin til sjúkrahúsið verður nýtt til.*

Hópuppsagnir á B6:

# Støðan er sum í kreppuárinum



*Støðan á B6 er nú so mikið vánalig, at sjúkrasystrar í hópatal hava sagt seg úr starvi. Tær eru tó tilreiðar at koma aftur til arbeiðis, um umstøðurnar verða betraðar.*

Mynd: Jens Kristian Vang.

**Játtanin til B6 er ikki vorðin justerað síðani 1992. Støðan er nú so ring, at 18 av 20 sjúkrasystrum á deildini hava sagt seg úr starvi. Tørvur á fleiri hondum og betri útbúnaði. Ein eykajáttan skal til, um endamálið skal røkkast, ljóða boðini frá B6**

HEILSUVERK
*Heri á Rógvi*

1.januar 2002 noyðast sjúklingarnir á B6 at leita leingi eftir kendum andlitum, tá ið átjan av teimum tjúgu sjúkrasystrunum á deildini hava sagt seg úr starvi. Vánaligu korini og væntandi viljin til at betra um støðuna hava fingið bikarið at flóta yvir hjá sjúkrasystrunum á deildini. Sum støðan er nú, so skal sjúkrahúsleiðslan til at finna 18 nýggj starvsfólk til deildini innan 1. januar, tá ið uppsagnartíðin hjá teimum verðandi sjúkrasystrunum gongur út. Persónligar orsøkir liggja til grundar fyri, at ikki allar 20 hava sagt seg úr starvi.s

B6 er medisinsk deild, har sjúklingar fáa viðgerð. Oftani er talan um rættiliga tungar sjúklingar, sum hava tørv á nógvari hjálp.

-Tað er ógvuliga strævið at arbeiða á deildini, og vit merkja tað eisini oftani á egnum kroppi, at tað er so mikið strævið, men sjúklingarnir skulu ikki líða, og hetta stigið hjá okkum er ikki eitt álop móti teimum, sigur Ingun Gaardbo, sum er 1. assistentur og starvsfólkaumboð á B6.

### Hendur og útbúnað

Stríðsspurningurin snýr seg ikki um lønir, sum tað so mangan ger í tílíkum málum. Heldur siga sjúkrasystrarnar seg hava ein ovurstóran tørv á bæði fleiri starvsfólkum og betri útbúnað.

-Vit mugu hava fleiri hendur at arbeiða á deildini. Vit hava sett sum krav, at sett verða 3,6 starvsfólk afturat. Eisini er stórur saknur eftir grundleggjandi góðum útbúnaði sum eitt nú sengur, tí hesar eru í rættiliga ringum standi, sigur Ingun Gaardbo.

Sum nú er, so er undirskotið fyri B6 1 mió fyri í fjør, og tað sær út sum um, at hetta verður nakað tað sama fyri hetta árið. Tey 3,6 starvsfólkini, sum kravið hjá sjúkrasystrunum ljóðar upp á, fara at kosa einar 800.000 krónur, og hetta má mestir fáast til vega við einari eykajáttan, tá ið støðan á hinum deildini, eftir hvat skilst, heldur ikki er alt for góð. Tað heldur torførari at meta um, hvussu nógv útbúnaðurin fer at kosta.

Tað ljóðar frá starvsfólkaumboðinum á B6, at tað er sera strævið at fáa tað at bera til hjá deildini, tá ið teir ikki kunnu skipa arbeiðið betur við verandi játtan og umstøðum. Hon nevnir eitt nú, at teir skulu nýta nógva orku til at ringja eftir fólki at kalla hvønn dag, og hetta er ikki at fáa sum mest burturúr arbeiðsorkuni.

### Gamalt stríð

Ónøgdin hjá sjúkrasystrunum á B6 er ikki nakað nýtt fyri sovítt. Støðan hevur verið rættiliga ring í nøgv ár. Ingun Gaardbo greiðir frá, at játtanin hevur ikki verið justerað móti øðrum enn lønarhækkingum síðani 1992. Hetta hevur merkt, at støðan hjá teimum er bert vorðin verri og verri við tíðini, og nú er mestsum ovboðið.

Hin 4. mai í ár varð eitt skriv sent til sjúkrahúsleiðsluna, har biðjið var um betri umstøður til deildini, og ein freist varð sett í august mánaði, at tá skuldi ein bati síggjast. Tey byrjaðu at hóma onkra betring, men sannaðu skjótt, at einki merkisvert var hent ella fór at henda, og ein nýggja freist varð ásett, og henda er nú eisin farin. Fylgjurnar síggja vit í dag.

-Vit kenna okkum forsømdar. Tað kann vera, at fleiri pengar eru játtaðir til heilsuverkið, men hesar hava vit ikki sæð nakað til, sigur Ingun Gaardbo.

Hon sigur, at stemningurin millum sjúkrasystrarnar sum nú er rímiliga góður, og tær eru eisini til reiðar at fara aftur til arbeiðis, um umstøðurnar eru til tað.

Tá vit spyrja Ingun, um heldur hetta vera partur av einum politiskum spæli, sigur, at tað sær út sum, at onkur verður noyddur at gjalda fyri fullveldi.

# ítróttur

Nr. 233 • leygardagur • 1. desember 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# Hjalgrím verður í KÍ

*Leiðslan í KÍ skrivaði í gjár sáttmála við Hjalgrím Elttør, sum sostatt verður verandi í felagnum*



**Hjalgrím Elltør, sum annars hevur verið settur í samband við B36, hevur longt sáttmálan við KÍ**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Seinastu tíðina hevur veri frammi, at evnaríki KÍ-leikarin, Hjalgrím Elttør, skal hava verið ávegis til B36.

Hjalgrim hevur eisini váttað fyri Sosialinum, at hann hevur fingið eitt tilboð frá B36, men at hann enn ikki hevði tikið støðu til, hvørt hann fór at taka av hesum.

Henda støðan varð tó tikin mikukvøldið, og hevur Hjalgrím gjørt av, at framtíðin verður í KÍ. Í hvussu so er komandi árið.

Á heimasíðuni hjá KÍ verður skrivað, at partarnir skrivaðu undir sáttmála mikukvøldið, og sjálvandi verður lagt afturat, at hetta er nakað, sum leiðslan í felagnum er fegin um.



# 22 milliónir í yvirskoti

**Flemming Østergaard kundi mikudagin vísa partaeigarunum í Parken Sport & Entertainment ein vakran ársroknskap**

FCK telist ikki millum mongu donsku fótbóltsfeløgini, sum hava trupult við at fáa endarnar at røkka saman.

Seinnu árini er felagið vorðið alsamt sterkari fíggjarliga, og hendan gongdin tykist at halda fram.

Í gjár kundi Flemming Østergaard, stjóri í FCK, leggja fram ársroknskapinum hjá felagnum fyri farna roknskaparárið, og úrslitið gjørdist heili 22 milliónir rætta vegin.

Umframt yvirskotið, hevur felagið eisini økt um partapeningin í árinum, soleiðis at samlaði eginpeningurin er øktur 100 mió.kr, og nú er heilar 300 mió.kr.

-jm

Stjørnan-Neistin 21-17 (12-10):

# Stjørnan hevði munin í vánaligum dysti

**Mistøkini vóru óteljandi, og hóast heimaliðið gekk undan, kláraði Neistin ikki at gera sær dælt av hesum**

HONDBÓLTUR - KVINNUR
*Eyðun Klakstein*

Hóast talan var um dyst millum tvey av bestu liðunum í kvinnukappingini, sást lítið til hetta í KÍ-høllini hóskvøldið.

Tað byrjaði væl. Simona Dzuigyte drønaði í kassan beinanvegin, Gunnleyg Berg var spæld fyrimyndarligar frí á strikuni, og tað sama var við Unu Olsen nakað seinni.

Men restina av dystinum vóru glottarnir fáir. Persónligu mistøkini vóru óteljandi, bæði liðini tveittu eitt ótal av bóltum burtur, og royndirnar vóru langt frá sannførandi.

Øll lið hava sínar vánaligu dagar, og hetta kvøldið mundu bæði liðini hava ein slíkan dag. Hóast Stjørnan gekk undan í at gera mistøk, so kláraði Neistin ikki at gera sær dælt av hesum, hóast møguleikin var til tað – serliga í fyrra hálvleiki.

Neistakvinnurnar vóru óneyvar í avgerandi løtum, og málverjin hjá Stjørnuni gjørdi nakrar týðandi bjargingar. Hevði hetta ikki verið úrslitið av royndunum, hevði Neistin lættliga kunnað verið frammanfyri við fleiri málum eftir fyrra hálvleik.



*Anna Kristina Samson hjá Stjørnuni og Gunnleyg Berg hjá Neistanum stríðast um bóltin.*

Mynd: Alexandar Djorovic

### Bleiktraðu eina løtu

Í seinna hálvleiki átti Stjørnan munin, og eina løtu beint eftir hálvleiksteðgin hevði liðið sína bestu løtu. Tá skoraðu tær fimm mál á rað og vunnu sær avgerandi munin í dystinum.

Neistin svaraði aftur og skoraði fimm mál á rað næstu minuttirnar, men Stjørnan fótaði sær aftur, og seinasta partin av dystinum hevði heimaliðið tamarhald á støðuni.

Toppskjúttin hjá Stjørnuni, Simona Dzuigyte, spældi ein vánaligan dyst. Hon skoraði seks mál, men hon brendi eina rúgvu av kjansum og tóktist stundum ómotiverað í verjuspælinum. Breiddin á Stjørnuliðnum stóð tí sína roynd, og hon kláraði seg.

Orsøkin var kontanta verjuspælið, sum Neistin hevði trupulleikar við, og hóast Súna Mørk lat verjuna upp eina løtu í seinna hálvleiki, so hevði Neistin ikki avgerandi orkuna til at vinna dystin.

Hetta var dystur millum liðini, sum fylgja eftir VÍF, og líkt er til, at tað serliga verður Stjørnan, sum skal bjóða VÍF av, tí liðið hevur vunnið báðar dystirnar móti Neistanum higartil.

### Dysturin í tølum:

**Stjørnan-Neistin 21-17 (12-10)**
Málskjúttar:
Stjørnan: Joan Midjord Joensen 7, Simona Dzuigyte 6 (1), Andrijana Milodanovic, Anna Kristina Samson 2, Bára Skaale 1, Una Olsen 1, Jastrid Gullaksen 1.
Neistin: Gunnleyg Berg 5, Katrin á Neystabø 3, Súna Mørk 3, Susan Brockie 3 (1), Rakul Augustinussen 2, Kára á Dunga 1
Brotskøst: Stjørnan 6, Neistin 3
Útvísingar Stjørnan 2, Neistin 3
Dómarar úr StÍF: Pole Hansen og Jústinus Justinussen